# Nú hvítna tindar…

SIGVALD KRISTIANSEN

Í samband við 100 ára hugleiðing um Edith Dahl í bløðunum farnu viku, er eisini stutt umrøða av sálminum **Nú hvítna tindar fjøllum á**, sum verður nógv sungin hesa tíð í kirkjum, samkomum, skúlum og heimum, og nógv sangkór hava hann eisini á skránni. Kirkjukórið Ljómur hevur av fyrstan tíð gjørt hann kendan, so at hann nú er at kalla fólkaogn. Hesin sálmur var – løgið nokk – ikki við í fyrstu sálmabókini – Sálmabók Føroya Fólks – frá 1960, men er við í næstu útgávu – Sálmabók Føroya Kirkju – frá 1990. Sálmurin er, sum tað stendur í sálmabókini, leyslig týðing hjá Robert Joensen av sálminum hjá Grundtvig: **Nu falmer skoven trindt om land**.

Í greinini um Edith Dahl stendur, at danski sálmurin varð sungin sum solosangur í **1940**, og at Edith tí tosar við Robert Joensen í Klaksvík og fær hann at týða sálmin til føroyskt. Frá **1. nov. 1942** og til dagin í dag hevur hann verið sungin í Vágs kirkju til konsert- og offurgudstænastuna.

Hetta fær meg at minnast aftur á skúladagarnar í Fuglafjarðar skúla, tá Sigurd Petersen, lærari, hevði sang við okkum børnum. Veturin 1941-42 vandu skúlabørnini í 5. og 6. flokki til konsert, sum skuldi haldast til frama fyri nýggjan fótbóltsvøll í Fuglafirði. Konsertin varð hildin í dansistovuni. Vit sungu mest danskar sangir, onkran føroyskan eisini, men tað, sum eg minnist best, er, at vit sungu **Nú hvítna tindar fjøllum á**. Hetta hevur verið tíðliga á ári 1942.

Sálmurin var prentaður á forsíðuni á **Kristiligt Ungmannablað, 1. oktober 1941. 8. árg. – NR. 1**. Lærarin skrivaði sálmin á talvuna, og vit skúlabørn skrivaðu hann av og lærdu hann uttanat. Orðingin var eitt lítið sindur øðrvísi, enn vit hava hana í sálmabókini í dag, og eg minnist væl, at ein annar lærari tá fýltist á onkran skeivan málburð og málsligar villur. Niðanfyri er upprunatýðingin úr Kr. Ungmannablað.

**Heyst**
*Lag:* Nu falmer Skoven trindt om Land.

Nú hvítna tindar fjøllum á,
má følva gras í dali,
hitt síðsta tjaldrið landi frá
fleyg burt við túsundtali.

Tað fuglaberg, sum fyrr var bygt,
tað er nú tómt og oyði,
har ikki sæst eitt fuglakykt
ei heldur meir á heiði.

Har sátur stóðu fram við á
er alt nú snøgt og nakið,
og eplir, røtur, hvørt eitt strá er
komið undir takið.

Har summargrøna velta var,
bert slokkastrúgvar spjaddir,
á bø er komin lamb og ær,
tí kalt er millum hæddir.

Takk fyri ávøkst, sum tú gav,
av bø og so av fjalli og alt,
sum ført varð yvir hav
og tað, sum er í hjalli.

Takk fyri hetta árið við
og alt á sjógv og landi.
Tú yvir vaksin lýs tín frið
og hvønn ein pilt á sandi.

Tey svinna burt, tey stuttu ár,
til heim tú mær manst boða;
og eftir vetur kemur vár
við sól og fjallaroða.

Og eina ferð vit fáa boð,
tá síðstu ferð vit anda,
Út yvir dal vit flúgva so,
hjá tær vit ævugt standa.

**Umyrkt eftir Grundtvig. R. J.**

Tað áhugaverda fyri meg í hesum sambandi er, at vit skúlabørn hava sungið hendan sálmin tríraddaðan á føroyskum til konsert í dansistovuni í Fuglafirði fyrst í árinum 1942, nærum eitt ár, áðrenn Kirkjukórið Ljómur hevur sungið hann fyrstu ferð í kirkjuni í Vági 1. nov. 1942.

Nevnast kann, at sálmurin er við í Heimamissións Sangbókini frá 1951 og 1975 í upprunatýðingini, og í Missións Sangbókini frá 1996 við teimum broytingum, sum eru í sálmabókini. Sálmurin er ikki at finna í Sangbók Føroya Fólks frá 1950 og 1976.

Eg fari at takka kirkjukórinum Ljómi fyri teirra lut í, at hesin vakri sálmur er vorðin ogn hjá Føroya fólki, og eg vil ynskja tykkum tillukku við 100 ára hátíðarhaldinum til minnis um Edith Dahl, kórleiðara.

# Er okkum lív lagð?

SOFUS DEBES JOHANNESEN



Eg lesi á internetinum, at Høgni Debes Joensen, landslækni, og Pál Weihe, granskari, mæla frá at vit yvirhøvur eta grind og spik, tí hetta er so nógv dálkað.

Samstundis lesi eg um ta øsing, sum Bill Justinussen og Jenis á Rana hava staðið fyri í løgtinginum um hetta tilmæli, tí teir halda tað vera alt ov víðgongt. Má smílast, tá júst hesir politikarar øsa seg um slíkt, tí teir plaga at standa fyri teimum mest víðgongdu sjónarmiðunum í løgtinginum.

Samstundis vil Bergtóra Høgnadóttir Joensen vera vil, at landslæknin hevur grein í sínum máli, tá hann mælir til grindabannið. Her er onki nýtt undir sólini.

Men álvaratos, skulu vit ikki sláa kalt vatn í blóðið! Tað hevur áður verið ávarað móti at eta ov nógva grind ella spik, og eisini hevur verið rátt frá, at gentur og ungar kvinnur eta grind, tí tað kann ávirka fertilitetsmøguleikarnar.

Alt gott um hetta, og kanska er eisini rætt at endurtaka og kanska herða hetta tilmælið.

Men hartil og heilt at bannað at eta grind haldi eg vera eitt langt og óneyðugt lop. Sá onkustaðni á internetinum, at løgmaður vildi taka málið um fullkomið grindabann upp í samgonguni.

Eg dugi ikki at síggja, at so víðgongd sjónarmið skulu vinna frama nú.

Síggi í Sosialinum í kvøld eisini aðrar ávaringar: "Barnakømur eru eiturbumbur" er ein yvirskrift og "multiresistensar bakteriur" er onnur. Hugsa vit um vanliga tíðindafloymin, so er næstan ikki dagur, at ikki okkurt, sum vit eta ella á annan hátt hava samband við, er sera vandamikið fyri okkum.

Hugsið til dømis um fartelefonirnar. Onnur hvør kanning sigur, at tað er vandamikið at tosa í fartelefon orsaka av radiobylgjunum, meðan onnur hvør sigur, at tað ikki er vandamikið.

Soleiðis kunnu vit halda fram.

Niðurstøðan er tann, at tað er vandamikið at liva! Og hetta er ikki nakað nýtt. Sagt hevur alla tíð verið, at ongin hevur yvirlitva lívið enn, og tað koma vit heldur ikki.

So hyggjuráðini eru enn sum áður: Alt við máta!

# Ikki lógarbrot at vera fullur

A. GUTTORMUR DJURHUUS



Høgni Hoydal ilskast í lesarabrævi inn á Sosialin, tí at hann nú ein dagin á framsíðuni hevði mynd av løgtingsmanni roykjandi ball og eina søgu um, at hann fyri nøkrum árum síðani hevði roykt hassj av misgávum, samstundis sum blaðið onga søgu hevði um ein landsstýrismann, sum hevur válað fullur í Reykjavík á almennari vitjan.

Sum limur í okkara lóggevandi tingi skuldi Høgni Hoydal verið vitandi um, at tað er loyvt at vera fullur, sjálvt um mann er landsstýrismaður, men at tað, sjálvt um mann er løgtingslimur, ikki er loyvt at roykja hassj.

Annar maðurin var lóglýðin, hin breyt lógina. Lat gá at tað var av misgáum og fyri nøkrum árum síðani. So søgan er kanska í so íligin fyri eitt tíðindablað at borðreiða við. Søgurnar hava als ikki nakað við hvørja aðra at gera. Onnur er rúkandi fesk, hin í so røst. Sjálvandi er tað av tí reinu tilvild, at tær eru á framsíðuni á okkara størstu tíðindabløðum sama dag.

Men lóg er lóg, og lóg skal haldast. Gott at bløðini hava eitt vakið eyga.

# Dropin hjá Jóannesi

KAI VÁGFJALL

kv@olivant.fo



Eftir at Javnaðarflokkurin "bara hevði umsitið borgarligan politik", sum ein fyrrverðandi javnaðarløgmaður einaferð tók til, í heili fýra ár, hevði Jóannes, og teir ráðandi í flokkinum, fingið nóg mikið av hesum borgarliga politikki, sum teir høvdu verið ein partur av. Millum annað høvdu teir sitið og góðtikið, at tey ríku fingu skattalætta, so tey gjørdist ríkari og tey ørmu gjørdist armari, meðan fakfeløgini øtaðust og góvu ilt av sær o.s.fr.

Tá valið í januar var av, høvdu veljararnir talað og givið Javnaðarflokkinum eitt dygt slag framman á, sum gav dvørgamál í homrum. Hetta førdi til, at leiðslan í Javnaðarflokkinum skilti, at nú "mátti vend koma í" sambært slagorðinum hjá teirra øskudólgi, sum eisini fekk dóm veljarans at kenna.

**Javnaðarveljarin ynskti javnaðarpolitik:**
Úrslitið av øllum hesum varð, at Javnaðarflokkurin skilti, hvat veljarin vildi, og mátti tí skifta hest. A og B vóru skift út við E og H. Nú varð endiliga gjørligt aftur at føra javnaðarpolitik. Vit høvdu fingið eina vinstrahalla samgongu, sum kundi føra næstan 100% javnaðarpolitik. Lovorðini mundi ongan enda tikið. Eitt samgonguskjal varð skrivað, har fleiri yvirtøkur vóru á skránni, sum m.a. fóru at føra til ein niðurskur í blokkinum við umleið stórthundrað milliónum krónum.

Men hvat hendi? Jú, tá samgongan skuldi koma saman og viðgera blokkniðurskurin, sum semja var um og var eisini niðurfelt í samgonguskjalið, sum nevnt, hoyknaði løgmaður undir trýstinum frá sambandsmonnunum í sínum egna flokki. Teir politisku dvørgarnir í flokkinum, serliga teir sunnan fyri Skopunarfjørð, løgdu vertin í javnaðarpolitikk, men vildu heldur hava danskan blokk. Trýstið var stórt og ósemjan innanfloks var so stór, og hetta var jú alment, at løgmaður sleit samgonguna. Hann valdi aftur "bara at umsita borgarligan politik" heldur enn at føra javnaðarpolitik.

**Dropin, sum fleyt yvir:**
Tá nú løgmaður varð bukaður av sínum egnu, til aftur at føra ein borgarligan sambandspolitik, vóru góð ráð dýr. Hvørja frágreiðing skuldi hann geva føroya fólki? Hann mátti hava eina skilagóða frágreiðin, har vit fingu at vita, hví flokkurin segði CHE-samgonguna upp. Ein lítil trupulleiki, um eina skrivstovu, sum langt síðani var loystur, varð tikin fram aftur, og brúktur sum orsøk til at slíta samgonguna. Umberingin var so láturlig, lítil og ússalig, at sjálvur kallaði løgmaður hetta fyri bara ein dropa, sum fekk bikarið at flóta yvir, men vit føroyingar vóru dyggiliga til grin uttanlands.

**Hvat var í bikarinum?**
Eftir sita vit so í dag og undrast yvir, hvat mundi vera í hesum bikarinum, sum fleyt yvir. Hevði tað ikki verið rætt, at vit fingu hetta fram í ljósið og lagt tað fram fyri føroya fólk, so einki var dult? Eg rokni við, at eingin hevði verið meira fegin um tað, enn sjálvur Høgni Hoydal, men tað torir Jóannes ikki, og hevur eisini sett seg ímóti einari kanning av hesum "lítla" máli. Orsøkin kann bara vera tann, at har er einki í bikarinum at finnast at, og at Jóannes tí avdúkaðar seg sjálvan, sum ein tann ússaligasti løgmaður, vit nakrantíð hava átt. Øll kenna vit eisini tað ummæli, sum hann fekk frá einum av sínum egnu, at hann var ein svíkjari, ja hann hevði svikið alt føroya fólk!

**Ruðuleikin í Javnaðarflokkinum:**
Hetta vita øll javnaðarfólk, og fyri at fjala útyvir teirra egnu ómegd, klandur og ruðuleika í flokkinum, royna tey at fáa fólki at venda eygunum burtur frá teimum stóru ínnanhýsis trupulleikunum, sum tey hava, við at útspilla og dálka Tjóðveldið og formann floksins, sum tykist ongan enda at taka. Hetta kom týðuliga til sjóndar á landsfundi floksins herfyri í Klaksvík, og teir halda nú áfram í bløðunum. Vit vanligir borgarar eru hóast alt ikki so tápuligir, at vit ikki duga at gjøgnumskoða allan bluffpolitikkin hjá Javnaðarflokkinum, sum ikki er annað enn ein stór luftbløðra. Tað sær út sum, at nú hevur flokkurin ikki bara ein øskudólg, men fleiri, sum sita og skava í øskuni ella óhumskuni.

**Hvørjum skulu vit hava álit á?**
Jóannes sigur, at hann hevði ikki longur álit á Høgna. Hví sigur hann okkum ikki, hví hann misti álitið á honum? At enda loyvi eg mær at spyrja, nú vit hava 27. novembur 2008, um vit føroyingar enn í dag skulu/kunnu hava álit á okkara fíggjarmálaráðharra?